STARVSLÝSING




Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir av nýggjum eftir

# Landsdjóralækna

## Chief Veterinary Officer (CVO)

**Uppgávur**

**Uppgávurnar hjá landsdjóralæknum eru serliga at:**

- skapa og dagføra reglur, ið stuðla undir tryggum, góðum matvørum og fóðri, góðari djóraheilsu og djóratrivnaði.
- tryggja at lógir- og kunngerðir eru fult út í samsvar við ES reglur innan matvørur og djóraheilsu, sum ásett í sáttmála millum partarnar.
- hava ábyrgdina av samskiftinum við ES innan karmarnar av heilsufrøðiligu avtaluni ið Landstýrið hevur við ES.
- fylgja við og luttaka í altjóða arbeiðnum á veterinera økinum og, har Føroyar hava fráboðanarskyldu, tá at standa fyri hesum, t.d. til OIE.
- hava ábyrgdina av loypandi yvirvøku og skráseting av djórasjúkum í Føroyum og taka neyðugu fyrisitingarligu avgerðirnar.
- leiða nýggju veterinerdeildina ið verður stovnsett á Heilsufrøðiligu starv-stovuni og verða partur av leiðslubólkinum á stovninum.
- umsita Løgtingslóg nr. 40 frá 23.04.1999 um djóralæknavirksemi v.m.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**

Tú skalt hava útbúgving sum djóralækni frá einum hægri lærustovni í norðan-londunum. Tað er ein fyrimunur at tú hevur royndir frá arbeiði við almennum veterinerum eftirliti og lógar- og kunngerðararbeiði. Kunnleiki til ES fyriskipanir og ES skipanina sum heild er eisini ein fyrimunur.

Væntað verður, at tú hevur góðan málsligan kunnleika til eingilskt í skrift og talu.

Væntað verður, at tú hevur hollar royndir við nýtslu av framkomnum edv skipanum, eins og koyrikort til persónbil er eitt krav.

**Vit vænta**

- miðvíst, sjálvstøðugt og nærlagt arbeiðslag og at tú annars er løtt/lættur at samstarva við.
- tú skalt hava áræði og framfýsni at náa settum málum og annars tola stórt arbeiðspress tá hart leikar á.
- tú sært nýggjar uppgávur sum nýggjar avbjóðingar.
- hevur góð evni at samskifta við onnur bæði í skrift og talu.
- ein arbeiðshátt, ið mennur starvsfólk á deildini og annars stuðlar undir víðari menningina av stovninum og fakøkinum sum heild.

**Vit bjóða**

- sera spennandi og sjálvstøðugt arbeiði innan karmarnar av ES avtaluni ið Landstýrið hevur við ES.
- eitt arbeiði í samstarvi við miðfyrisitingina, vinnufyritøkur og vinnu- og onnur áhugafeløg, har tú kemur at læra nógv fólk at kenna.
- støðuga og skipaða førleikamenning og annars eitt gott arbeiðsumhvørvi har tú kemur at arbeiða saman við dugnaligum og engageraðum starvsfólki, við hollum útbúgvingum og royndum.
- arbeiðsamboðini eru framkomin og arbeiðsumhvørvi sera frítt.
- væntast kann nakað væl at uttanlanda ferðing, serliga í Norðanlondum og til ES stovnar.

**Tíð og setanarviðurskifti**

Starvið er fulla tíð. Vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum, so starvsbyrjanin er nakað, ið vit kunnu avtala.

Arbeiðsstaðurin er á Falkavegi 6 í Tórshavn, har partur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni húsast.

Starvið sum Landsdjóralækni verður áramálssett til 5 ár sambært sersáttmála, og lønin er samsvarandi 37. flokki hjá tænastumonnunum + 20%, tó uttan at verða tænastumannastarv. Við lønartalvunum pr. 1. oktober í 2007 er lønin 42.201,63 kr/mánaða + 20 % ískoyti vegna áramálssetan, t.e. + 8.440,33 kr/mánaða ella íalt 50.641,96 kr/mánaða.

Eftirlønargjaldið er 15% av 42.201,63 t.e. 6.330,25 kr/mánaða.

Væntað verður, at tú kanst byrja í starvinum, 1. september 2008.

Starvsheitið á føroyskum er Landsdjóralækni og á eingilskum Chief Veterinary Officer, CVO.

**Umsókn til starvið**

Umsókn við CV, avriti av prógvum og viðmælum, skal verða okkum í hendi seinast 10. juli 2008.

Donsk útgáva av lýsingini, verður eisini latin donskum og møguliga norskum faktíðarriti. Um ivamál verða, er tað føroyski teksturin ið er galdandi.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast frá Bárði Enni stjóra.

Upplýsingar um stovnin, síggjast á www.hfs.fo.

**Stutt um Heilsufrøðiligu starvsstovuna**

Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og røkir almennu uppgávurnar á matvøru- og veterinerøkinum. Framtíðar meginreglurnar verða »av grunni at munni« /»úr haga í maga« og annars fult út í samsvar við nýggjastu ES fyriskipaninar.

Stovnurin er skipaður í ein eftirlitspart, ein kanningarstovupart og eina felags skrivstovu. Talið av starvsfólkum er íalt áleið 45 fólk, harav minna helvtin eru akademikarar, harav 4 embætisdjóralæknar, hin helvtin eru teknikarar og nøkur hjálparfólk. Stovnurin húsast á tveimum bústøðum í Havn og rekur annars 3 marknaðeftirlitsstøðir í Føroyum. Stovnsett er ein veteriner døgnvaktarskipan

Fyrst í 2008 var veterinerdeildin íroknað landsdjóralæknaembætið, flutt frá Vinnumálaráðnum til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

**Veterinerdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni**

Veterinerdeildin er skipað sum ein stápsfunktión á stovninum. Deildin verður leidd av landsdjóralæknanum. Aftrat landsdjóralæknanum, er deildin normerað við einum embætisdjóralækna sum í løtuni er ósett og væntandi tveimum juristum, ið skulu setast í næstum.

**Stutt um veterineru avtaluna millum ES og Føroyar**

Veterineravtalan millum ES og Føroyar ásetur at Føroyar skulu hava somu rættarreglur sum ES, fyri at tryggja góðum matvørum og fóðri, góðari djóraheilsu og djóratrivnaði. Hetta loyvir Føroyum at útflyta fisk og fiskaúrdráttir frítt til ES, uttan nakað marknaeftirlit í ES. Somuleiðis kann ES innflyta allar vørur av djórauppruna og livandi djór til Føroya.

Innflutningur av matvørum og fóðri úr 3. londum skal umvegis marknaeft-irlitsstøð.

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

VASTI 459010